## Beinta um Tjóðpallin

Eg haldi, at tað er gott, at ein Tjóðpallur endiliga er komin. Hopi, at við Tjóðpallinum fer man at síggja hvussu ríkt sjónleikalívið er í Føroyum, og hvussu nógv vilja vera við til at ríka tað. Eg vóni eisini, at Tjóðpallurin kann fáa onnur at útbúgva seg sum sjónleikara. Eisini haldi eg, at Tjóðpallurin kann vera við til at vísa, at man kann brúka sjónleik til annað enn pall og sjónvarp.



## Beinta um danir

Eg havi kent meg væl millum danir, hesi árini eg havi búð í Danmark. Men eg haldi ikki, at teir eru eitt so opið eitt fólkaslag. Í summum førum eru tey í øllum førum ikki so opin. Men eg búgvi í Odense, sum er ein eitt sindur lukkaður býur.

# Sjónleikur avdúkar fólk og samfelag

**Leygarkvøldið fer føroyska Beinta Clothier á pall seinastu ferð í leiklutinum sum Candy í leikinum Kærlighed og menneskerester av kanadiumanninum Brad Fraser. Hetta verður somuleiðis seinasta framførslan hjá Beintu á Skuespillerskolen ved Odense Teater, har Beinta eftir fýra spennandi ár nú hevur lokið prógv sum yrkissjónleikari**

## Samrøða



**Niels Uni Dam**
blaðmaður
nielsuni@sosialurin.fo

Beinta Clothier er ikki heilt heilt óskrivað blað á føroyska sjónleikapallinum. Vit hava upplivað hana í leikum sum Pippi, Pinocchio, Skeyk, Renn fyri vívinum, Einki er sum mammusa gras og Leikhúsjólum, umframt í útisjónleikum á ólavsøku. Og áhugin fyri sjónleiki hevur sambært Beintu altíð verið har.

– Mær hevur altíð dámt at spælt sjónleik. Eg veit ikki um nakað annað arbeiði, har tað eitur, at eg fari at spæla. Eg veit ikki hvat annað, ið eg skuldi gjørt, greiður Beinta frá.

Men hvat er tað, sum bergtekur við sjónleikinum.

– Tað sum fasinerar meg mest við sjónleiki, er sjónleikur er at vísa ein spegil upp á samfelagið og hvussu menniskju eru. Hetta síggi eg sum tí mest fornemmu uppgávuna, sum sjónleikur hevur, og hetta hevur verið mín drívmegi fyri at fáast við sjónleik.

### Vildi investera í sjónleikin

Fyri fýra árum síðan tók Beinta lopið úr trygga umhvørvinum í Havn og kenda pallinum í Sjónleikarhúsinum og fór til Odense á sjónleikaraskúla.

– Eg hevði spælt áhugaleik og hevði verið á nógvum skeiðum. Men eg hugsaði, at skal eg liva av hesum, so má eg eisini investera í tað og dyrka tað við at fara á skúla og fáa diplom uppá, at eg eri sjónleikari. Ikki tí man ikki kann spæla sjónleik uttan at vera útbúgvin. Men, ja, hetta ljóðar kanska sum snobbarí, men tað er ein munur á at vera útbúgvin, at taka sær tíð til at læra og so er tað feitt at dyrka okkurt.

Beinta hevði hoyrt gott um almennu sjónleikaraskúlarnar í Danmark, og valdi at royna at søkja inn. Hetta var fyrst og fremst ein avbjóðing ella ein roynd, ið hon gjørdi. Hon kannaði eisini skúlan í Reykjavík, men hesin var við universitetið, og har kravdist student ella HF, og tað hevur Beinta ikki.

– Tað kundi sjálvandi eisini verið spennandi, at fari útum Norðurlond. Men hetta var fyrstu ferð, at eg søkti, og eg visti ikki hvat, ið fór at henda og donsku skúlarnir hevði, eg hoyrt nógv gott um frá fólki, sum høvdu gingið har.

### Strævin upptøkuroynd

735 fólk søktu inn á teir tríggjar almennu sjónleikaraskúlarnar og einans átta sluppu inn á hvønn. Hetta setti sín dám á upptøkuroyndirnar, ið Beinta kendi sum øgiliga krevjandi.

– Man føldi nervøsitetin millum fólk. Serliga triðja royndin í Odense, ið vardi fýra dagar, var øgiliga krevjandi. Tá er man ikki so nógv, so man veit, at møguleikin er fyri at sleppa inn, og man verður alla tíðina eygleiddur av teimum, sum avgera um man sleppur inn. Tey siga, at hetta er orsøkin til at vit onga eksamiu hava, tí upptøkuroyndin er ein eksamia. Øll átta, sum sleppa inn, halda eisini vanliga fram øll fýra árini.

– At byrja á sjónleikarskúlanum var heilt forferdiliga yvirveldandi, eg kendi ikki býin, sum eg flutti til og á skúlanum skuldi eg knappiliga fyrihalda meg til sjey fólk, sum eg skuldi deila alt við í fýra ár, greiðir Beinta frá, og júst hetta sambandi við sjey onnur fólk hevur verið sera stórur partur av lívinum hjá Beintu seinastu fýra árini.

– Vit átta eru øgiliga tætt knýtt. Vit hava altíð fingið at vita, at vit vóru átta individualistar, men tá vit arbeiða á gólvinum, arbeiða vit fyri at skapa tí góðu søguna. Vit hava lært at arbeiða saman. Burtursæð frá at sova, hava vit gjørt næstan alt saman hesi fýra árini.

### Persónlig menning

Beinta var eisini ovfarin av leistinum, ið frálæran varð løgd til rættis eftir. Rektararin á skúlanum, tá Beinta byrjaði var Lane Lind, ið er gift við Eyðuni Johannesen. Hon hevði verið rektari í 14 ár, og hevði lagt útbúgvingina væl til rættis eftir sínum royndum. Fyrstu árini varð arbeitt nógv við persónligari menning.

– Rektarin segði, at nógvir av hennara javnaldrandi kollegaum